# Miðlamjarr

So var tíð uppá at finna vetrarklæðini hjá børnunum fram aftur (ok, ikki tí at tey hava verið goymd burtur í summar)

***Kvinna, 35 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Inna Törnroos



*Eg yvirlivi persónliga upp á dansin.*

Vígdis Hentze Olsen, føroyskur dansari í New York (Dimma)

Hvørja ferð víðgongdir minnilutar í Føroyum gloppa nevið, versnar landsins umdømi. Ein máti at staðfesta landsins tolsemi og menniskjaligu kós er at samtykkja altjóða mannarættindini í føroysku stjórnarskipanini og við henni vísa umheiminum, hvørjum føroyingar veruliga standa fyri.

***Maður, 40 ár***



*Menn gera sær ómak, tá kvinnur eru hjástaddar.*

Clement Kjersgaard, sjónvarps-maður, heldur, at kvinnur hava góða ávirkan á menn (Euroman)



*Eg haldi, at vit heldur skuldu givið løgtingslimum hægri løn, men aftur fyri kravt, at teir ikki høvdu nakað annað arbeiði við síðuna av.*

Magni Laksáfoss, løgtingslimur, um uppskotið at lækka lønirnar hjá tingfólki (Sosialurin)

*Tað finnast ítróttar-avlamin. Eg vil siga, at í flestu førum er talan um skeivar venjingarhættir.*

Magni Mohr, Ph. D. í Humanari Fysiologi, um ítrótt og skaðar (V)



Heilt erligt, so dámar mær einki, at flogvøllurin skal leingjast oman ímóti Sørvagi. Haldi hann er ríkiliga tætt uppá. Hugsi serliga um allan motorosin, vit og ikki minst okkara børn, anda í okkum. Hugsið tykkum, tá flogførini fara avstað og standa eina góða løtu og dálka luftina. Barnagarðurin er beint niðri undir vøllinum.

***Kvinna, 35 ár***

Ongin landsdystur í KvF, mannminkandi viðferð av samkyndum, ókeypis fiskur til teir múgvandi, húsamarknaður sum minnir um trælahald, niðast í Pisa, hægst í prísum. Hvussu eitur landið?

***Maður, 39 ár***





*Eg eri skelkaður av diagnosuni, men eg eri eisini avkláraður við, at nú er ein harður dystur fyri framman. Hetta er ein dystur, sum eg ætli mær at vinna.*

41 ára gamli fyrrverandi fótbóltsspælarin Brian Laudrup um at hava fingið staðfest krabbamein. (Ekstrablaðið)

*Fyrigeving er eitt slag av kærleika*

Natascha Kampusch, sum í átta ár var innstongd, pínd og misbrúkt av Wolfgang Priklop, hevur fyrigivið honum

Scientists have finally figured out, what is wrong with men. The problem lies in the two halves of their brains - the left and the right. The left half has nothing right in it, and the right half has nothing left in it! :)

***Kvinna, 40 ár***